


www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 10 - 2011

# Oljan væl umboðað á FAROEXPO

Fleiri fyritøkur í føroysku frálanda- og oljuvinnuni luttaka á árligu vinnustevnuni í Runavík hesa vikuna. Stóra vinnustevnan Faroexpo verður hildin í Runavík komandi dagarnar. Á stevnuni, sum bæði er ein framsýning, ráðstevna og mentanarvika, er hópurin av føroyskum og útlendskum fyrittøkum, sum røkka frá fiskivinnu til oljuvinnu og aðra vinnu. Stevnan er so eisini merkt av, at føroyingar so smátt eru farnir at fáa fótin fastan í olju- og frálandavinnuni. Millum mongu luttakararnar eru fleiri fyritøkur, sum arbeiða antin burturav í hesi vinnum ella eru veitarar til vinnuna, tá leitivirksemi er á føroyska landgrunninum. Runavík er eisini plássið í Føroyum, sum hýsir einastu oljuhavnini. Atlantic Supply Base er tí sjálvandi millum luttakandi fyritøkurnar á Faroexpo. Útgerðarstøðin verður so eisini í miðdeplinum um nakrar fáar mánaðir, tá Statoil fer at bora á landgrunninum. Onnur luttakandi virki, sum hava tilknýti til oljuvinnuna, eru m.a. El-Service, Faroe Ship, MEST, Atlantic Airways, Thor, Supply Service og Trygdarmiðstøðin. Eisini Virkisráðgeving, sum ein av stigtakarunum til vinnustevnuna, Símun Hammer stendur fyri, luttekur. Fyritøkan hevur fylgt oljuleitingini við Føroyar, síðani henda byrjaði fyri mongum árum síðani. Hóast Faroexpo tó er mest merkt av fiskivinnu og alivinnu, so má tó sigast, at vinnutiltakið, sum hevur sjey ár á baki, eisini er við at gerast karmurin rundan um spírandi frálanda- og oljuvinnuna her á landi. Endamálið við Faroexpo er at styrkja sambandið millum vinnufyritøkur kring landið umframt millum føroyskar og útlendskar fyritøkur.?Høvuðssponsorur fyri tiltakið er BankNordic, meðan Statoil og Bakkafrost eru hjásponsorar. Stevnan fevnir eisini um eina ráðstevnu við fyrilestrum og annars hópi av mentanarligum tiltøkum. Eitt av endamálunum við øllum hesum spennandi og óføra tiltakinum í Runavík er eisini at byggja brýr millum vinnu og mentan.